# Hvat bleiv av børnunum?



*Á hesi myndini, ið er tikin í samband við at grundin til Dronning Alexandrines Hospital varð liðugt lagað, er mynd tikin av arbeiðsfólkinum. Millum hesar er ein nevndur Dánjal Jacob Danielsen (nr. 3 í fremra rað) Kann hesin sami Danjal verða sonur Danjal og Elisabeth, sum var føddur í 1865? Um so var, er hann 57 ára gamal á myndini, sum kann passa væl*

**Hvat bleiv av børnunum hjá Dánjal Magnussen og Elisabeth f. Simonsen?**

Havnarmaðurin Annfinn Danielsen hevur sent okkum ein fyrispurning um hvat bleiv av børnunum hjá Dánjal Magnussen og Elisabeth f. Simonsen. Upplýsingar um børnini hjá Dánjal og Elisabeth eru av áhuga, serliga um Magnus, Malenu, Carl Christian, Daniel og Hans, sum hann einki veit um.

Til ber at seta seg í samband við Annfinn Danielsen á tlf. 224124.

**Í fólkateljingin í 1870 er familjan hendan:**

| **Hus nr. 70** | **Aldur** | **Starv** | **Føðistaður** |
|---|---|---|---|
| 1. Daniel Magnussen | 51 g | Husfa. Handelsbet. | Strænder S. |
| 2. Elisabeth f. Simonsen | 47 g | Husmoder | Sand |
| 3. Andrea Vilh. Frederikke Danielsen (endaði niðri, doyði ung í Keypmannahavn, átti sonin Anton Andrésen) | 19 u | Datter | Fiskevirkning Thorshavn |
| 4. Malene Elisabeth Johanne do | 17 u | do | hjælper Moderen do |
| 5. Jacobine Soph. Valentine do (átti 5 børn, sum eg kenni ) d. 3.08.1947. | 15 u | do | Fiskevirkning f. 14.02.1855 |
| 6. Carl Christian Fre Danielsen | 13 u | Søn | |
| 7. Emil Fr. Danielsen (ógiftur, seinni skipari) | 11 u | Søn | f. 24.12.1858 |
| 8. Meta Henrikke Marie Danielsen (evnaveik) (búði hjá Binu) | 9 u d. 31.10.1937 | Datter | f. 31.12.1860 |
| 9. Daniel Danielsen | 7 u | Søn | f. 1865. |
| 10. Elisabeth Danielsen (ógift, barnleys, men fostraði systursonin Jacob, Búði á Bakkahellu) d. 1938. | 5 u | Datter | ekpetrica f. 21.07.1864 |
| 11. Hans Danielsen | 3 u | Søn | f. 8.01.1867 |
| 12. Mikkel Mikkelsen | 40 g | Faderens Medhjælper Sand Søn af en odelsmand paa Sand. Opholdskom. Sand. | |

**Í teljingini fyri 1855 eru børnini 4 í tali, og her er ein sonur, sum ikki er nevndur í 1870:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Magnus Jacob Andreas Danielsen | 8 u | Deres Barn | f. 1847 |

Børnini hjá Binu (Jacobina), sum búði í Klettaskot (á Doktaragrund).

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. Jacob Danielsen, | f. 4.06.1887 | d. 30.01.1945 | Róptur "G" - 13 børn |
| 2. Jørgin Danielsen | f. 5.7.1879 | d. 26.05.1967 | 87 ár, giftur Juliu, av Viðareiði, róptur Havna-Jørgin í Vági. Barnleys. |
| 3. Christina g. Lind, | f. 21.11.1884 | d. 1945 | Giftist til Svínoyar v. Guttorm Mikkelsen, og í 2. giftu Poul Lind. Átti 3 børn: Hans Petur Carolina Maria (Danmark), Gunhild, (giftist á Skála) |
| 4. Claudie g. Thomsen | f. 8.11.1890 Kollafj. - 9 børn. | d. 31.03.1986 | Gift Bernhard Thomsen, Oyrareingir, |
| 5. Elisabeth | f. 18.07.1875 | | (Hvør er hendan ? ) |

Lesið Sosialin -so eru tit við!



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýføddu barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin